# Grind í Havn

**Í góðveðrinum í morgun fann Norröna eina grind miðskeiðis millum Borðina og Kirkjubønes**

GRINDADRÁP
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Á veg úr Hanstholm móti Havnini fann manningin á Norrönu eina grind millum Borðina og Kirkjubønes. Hetta var klokkan 05.40 í morgun. Tá so mikið av báti var komin út, varð grindin rikin móti Havnini, men bíðað varð við at fara heilt inn móti Sandágerði, til fleiri bátar vóru komnir at luttaka í rakstrinum.

Tá so tíðindini komu í útvarpið og á Portalin, var skjótt at nógvur bátur stevndi út móti grindini, sum var hildin til um áttatíðina.

Í skrivandi løtu verður mett av Politistøðini og hjá kommununi, at grindin liggur millum 180 og 200 hvalir. Sýslumaðurin hevði tá ikki gjørt av, um grindin bert skuldi skiftast til drápspartar, ella um nakað eisini skuldi til heimapartar.

Vanliga eru einir 1400 drápspartar, men av tí at grindin varð funnin so tíðliga, er talið nakað minni, sigur Jens Marius Poulsen, kommunustjóri. Hann upplýsir, at tað vóru eini 600 luttakarar á sandinum og nakað tað sama í báti. Sostatt er talan um einar 1200 drápspartar.





*Grindin varð hildin til um áttatíðina í morgun, og tað tók á leið ein hálvan tíma at fáa lívið av teimum 180 til 200 hvalunum*

